

**N-Jón Ellendersen,**
*hálvur famieningur*

# Navnið Famien, gitingar og veruleiki

*Í Sosialinum frá mikudegnum 21. apríl nevnir Snorri Brend, at navnið Famien møguliga stavar frá søgnini um Jansaguttarnar um ta ferðina, fegðgarnir høvdu rænt eina kvinnu av einum sjórænarskipi.*

Tá skal onkur á skipinum hava rópt okkurt sum femme mien (hetta hevur havt alskyns formar alt eftir, hvør hevur sagt frá søgnini) og soleiðis skal bygdin Famien hava fingið sítt navn. Men hetta er lítið annað enn sera fantasifullar gitingar. Veruleikin er helst ein heilt annar.

Famien er nevniliga eitt vanligt, gamalt franskt eftirnavn, sum m. a. kemur fyri í bókini »William Shakespear« hjá Victor Hugo frá 1886. Somuleiðis er navnið eisini at finna sum staðarnavn í fransktalandi londum, sum gentunavn og sum staðarnavn og for/eftirnavn í arabiska heiminum, so tað er meiri sannlíkt, at talan hevur verið um sjórænarar úr Algier, sum vóru rættiliga kendir um okkara leiðir tá á døgum. Fransktalandi hava teir møguliga verið síðani Algier var fronsk koloni, men teir hava ikki havt franskt sum móðurmál.

***Famien er nevniliga eitt vanligt, gamalt franskt eftirnavn.***

Fransmenn komu ikki so ofta á okkara leiðir og hendi tað, so vóru tað heldur fronsk herskip, sum vit td. kenna frá Barbaru hjá Jørgen Frantz Jacobsen. Tí ber eisini til, at Jansaguttarnir hava verið umborð á einum fronskum herskipi, sum ikki so sjáldan høvdu konufólk við umborð. Hetta snúði seg antin um konu skiparans ella dóttir ella kona reiðarans og helst er eingin ivi um, at onkur á skipinum hevur borið navnið Famien, antin sum for- ella eftirnavn.

Hin uppfatanin, at sjórænarin sum skuldi hava rópt: femme mien ella okkurt líknandi á fronskum, er meiri spekulativ og skemtilig enn hon er sonn. Tað er rættiliga óhugsandi at ein arabiskt talandi sjórænari skuldi rópa eftir eini kvinnu á fronskum.

Tað er meiri sannlíkt at kvinnan hevur verið rópt Famien ella, at hon hevur rópt á ein mann á skipinum, sum hevur itið Famien.

Sjálvandi fáa vit aldri við vissu at vita hvat rópt varð av skipinum ella hvat kvinnan í bátinum hjá Jansaguttunum rópti. Men eftir at eg havi kannað hetta í nøkur ár, dugi eg illa at ímynda mær annað enn tað, at tað her hevur verið talan um Famien antin sum gentunavn, við tað at tað eisini hevur verið nýtt sum gentunavn í gamlari tíð ella, at tað snýr seg um eftirnavnið Famien.

Hinvegin hevur eftirnavnið Famien sín uppruna frá onkrum av teimum mongu støðunum, sum bera heitið Famien og soleiðis er tað aftur enda sum eitt staðarnavn á Suðuroynni.

## Kjakfundur um Public Service sáttmálan

Mikukvøldið verður ein kjakfundur um Public Service sáttmálan í Miðlahúsinum. Tað er Ráðið fyri Brekað, sum skipar fyri fundinum, sum tekur støði í Public Service Sáttmálanum, parti 5, sum snýr seg um tænastur til fólk við breki. Aðalorðaskifti um sáttmálan var á Føroya Løgtingi í november í fjør.

– Endamálið er at fáa eitt gevandi orðaskifti, ið varpar ljós á spurningin um, hví allir borgarar í okkara samfelag ikki hava møguleika at luttaka á jøvnum føti, sigur Barbara á Tjaldrafløtti, forkvinna í Ráðnum fyri Brekað.

Orðstýrari á fundinum verður Rigmor Dam, blaðkvinna.

Teknmálstulkar: Eyðgun Hansen og Edny Poulsen

Barbara á Tjaldrafløtti fer at bjóða vælkomin, og síðani fáa fólkini við pallborðið 3-5 minuttir hvør til framløgur. Við pallborðið sita Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna. Hon fer at tosa um politisku ætlanirnar við sáttmálanum. Leila Solmunde, forkvinn aí MBF fer at tosa um rættin til kunning. Hans Trúgvi Teirin, sum er hoyrtarnaður, fer at tosa um, hvørjar forðingar er í gerandisdegnum. Og Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri, fer at tos aum tænastu til fólk við breki.

Eftir framløgurnar verður pallborðsorðaskifti og samanumtøka.



**Zakarias Wang**

# 14% fyri blokkin!

Nú er tað fullprógvað, at Føroyar eru heimsins dýrasta land at búgva í, 14% dýrari enn Danmark, tað land, sum annars hevur havt hetta metið.

Hvør er orsøkin?

Eftir tí David Hume vísti á í 1752 elvir stuðul uttanífrá til prísvøkstur.

Hetta er ein læra, sum tað ikki hevur eydnast nøkrum at reka aftur farnu tríggjar øldirnar.

Tey 14%, sum brúkararnir í Føroyum noyðast til at gjalda, er tí – fullkomuliga í tráð við allar økonomiskar lærusetningar – púra einfalt prísurin fyri blokkin.



**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*

# Blokkurin má tiðnast upp

*Eg fari – vegna sera nógva føroyingar – at heita á fíggjarnevndina um at biðja løgmann og fíggjarmálaráðharran um at rætta skeivleikan, ið varð gjørdur fyri nøkrum árum síðan: Prístalsregulerið blokkin – afturvirkandi frá 2002 – og oyramerkið hesar árligu 125 milliónirnar at fara til almanna-, heilsu- og skúlaøkið.*

Tað er sera hart hjá mongum føroyingi at síggja, at samfelag okkara liggur í fíggjarligum andaleypi orsakað av, at fullveldisfólk skóru blokkin niður við 366 milliónum krónum árliga fyri nøkrum árum síðani. Hví varð peningur ikki lagdur til viks í teimum góðu tíðunum, verður spurt? Jú, tað vit skuldu lagt til síðis – varð givið burtur til Danmarkar. Tað er mær ein gáta, hví loysingafólk skulu taka kvørkratak á føroyingar, fyri at staturin skal spara. Er tað ikki serliga Tjóðveldi, ið sigur, at staturin hvørt ár vinnur milliardir av krónum í spardum NATO limagjaldi orsakað av strategisku placeringini av Føroyum? Er ikki rímiligt, at nakrar av hesum spardu krónum fella aftur til Føroyar og gera gagn í vælferðarsamfelagnum?

***Er tað ikki serliga Tjóðveldi, ið sigur, at staturin hvørt ár vinnur milliardir av krónum í spardum NATO limagjaldi?***

Nú tørvar okkum hendan burturgivna pening í ólukkumát. Óføra gávumildni hevur higartil kostað Føroyum umleið fýra milliardir krónur. Ei undur í, at peningur tørvar.

Blokkurin var ikki bert skerdur, men eisini fastfrystur í 2002. Tað merkir, at staturin nú sparir uml 125 milliónir krónur árliga, ið eftirverandi ríkisveiting átti at verið hægri. Føroyingar mugu so aftur spara hesa upphædd innan økir, ið flest øll hava ov lítið sum

Vit hoyra nú, at fíggjarlógin komandi ár skal spara hundratals milliónir. Fíggjarnevndin leggur upp til sera stórar sparingar – hoyra vit í pressuni.

Tað er onki at ivast í, at ein partur av loysnini av fíggjarliga trupulleikanum, vit eru í, er at tiðna ríkisveitingina uppaftur.